











# Vælhildin sethús í eysturbýnum í Havn

Sethúsini eru í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er inngongd, rúmlig gongd við gardarobu, vesi, baðirúm við brúsu, køkur, stova og trý kømur. Stovan er stór og í vinkul við spísikróki. Opið er millum køk og spísikrók. Hjúnarúmið hevur atgongd til altanina. Frá køkini er ein niðurgongd til kjallaran og út til hjallin.

Í niðaru hæddini er baðirúm við brúsu, trý kømur, stór stova, vaskirúm og kjallararúm. Vindeygu og hurðar eru skift í 2003. Nýggj oljufýr frá 2005. Rundanum húsini er alt gjørt, stórur og vælhildin urtagarður og sera flottur lagaður grótgarður. Terassan og túnið rundanum húsini er flísalagt.

Húsini er sera vælhildin og standa sera væl fyri í barnavinarligum og friðarligum umhvørvi á Spógvavegnum. Stutt til handlar og arbeiðspláss uppi á Hálsi. Skjótt til Gundadals, har bæði fótbóltsvøllur, ítróttarhallir, svimjihøll og spælipláss eru. Eysturskúlan og Barnagarðurin á Konmansmýru liggja bert fáa minuttir frá húsunum. Eisini er stutt til miðbýin.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

Adressa .......... Spógvav. 40, Tórshavn
Byggiár:........... 1980
Hæddir:........... 2
Stødd innan: ... 240 m²
Grundøkið: ..... 427 m²
Prísuppskot: ... Kr. 2.450.000,-

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**